JØRN JENSEN

Gev mær posan, Rói



„Hey Rói,“ sigur pápi.
„Tað er gott, at tú ert her.

Leika vil sleppa út.
Far ein túr við henni.“

„Áh,“ sigur Rói.
„Kann hon ikki bíða?“

„Nei,“ sigur pápi.
„Leika stendur og hvínur.
Far nú.“

„So møti eg bara Bessa,“
sigur Rói.

„Bessa,“ sigur pápi.
„Hvat so?“

„Hann er býttur,“ sigur Rói.
„Hann ger fortreð.“

„Nú so,“ sigur pápi.
„Jamen tú hevur Leiku við.
So hendir einki.“

„Alt í lagi,“ sigur Rói.
„So fari eg.“

Rói tekur bandið.
Hann festir tað um hálsin á Leiku.

„Minst til posan," sigur pápi.
„Leika skal kukka."

„Ja, ja," sigur Rói.
Hann tekur ein posa.
Ein lítlan posa.
Hann er til kukkin.

Hann tekur ein posa afturat.
Ein stóran posa.

Hann er til tann lítla posan.

So sær eingin kukkin.

„Kom so, Leika."

Rói fer út.
Hann hyggur rundan um seg.

Her er eingin.
Heldur ikki Bessi.

Hann fer inn í viðarlundina.
Leika hálar í bandið.

So setir hon seg.
Hon kukkar.

„Huff,“ hugsar Rói.
„Kukkurin skal takast upp.

Ein heitur kukkur.
Tað er ólekkurt.“

„Hey,“ sigur onkur.

Rói hvøkkur við.
Hann vendir sær á.

Tað er bara Sanna.
„Hey, Sanna.“

Sanna flennir.
„Bleivst tú kløkkur?“

„Nei,“ sigur Rói.
Hann hyggur rundan
um seg.

Sanna flennir aftur.
„Leika dugir væl.

Hon hevur kukkað.
Ein flottan kukk.“

„Úh," sigur Rói.
„Tað er ólekkurt."

Hann fær sær posan um hondina.
So tekur hann kukkin upp.

Hann bindur ein knút á posan.
Nú hevur hann kukkin.

Hann koyrir hann í posan.
Tann stóra posan.

Hann hyggur aftur rundan um seg.
Bessi er ikki har.

„Kom, Leika," sigur Rói.
„Nú fara vit heim."



Sanna hyggur at honum.
„Hvørjum leitar tú eftir?
Er tað Bessa?“

Rói nikkar.
„Ja, hann er skítbýttur.
Hann er altíð eftir mær.“

„Eg komi við,“ sigur Sanna.
„So eru vit trý.

Leika er eisini her.
Vit skulu nokk hjálpa tær.“

Tey fara heimeftir.

So hoyra tey onkran siga:
„Hey, Rói!“

Rói hvøkkur við.
Hann vendir sær á.

Tað er Bessi.
Hann er á súkklu.

Og hann smílist.
„Nú, smábørn.
Gott veður, ha?“

Rói nikkar.
Hvat skal hann gera?

Hann kann renna.
Men tað nyttar einki.

Bessi er á súkklu.

Bessi kemur yvir til hansara.
„Nú, lítli.
Hvat hevur tú í posanum?“

„Einki,“ sigur Rói.

Bessi flennir.
„Einki?
Lat meg síggja.“

Rói fær eitt hugskot.
Hann skal lumpa Bessa.

„Nei,“ sigur hann.
„Tað er bomm.

Men tú fært tað ikki.
Eg eigi tað.“

„Ordan," sigur Bessi.
„So mást tú velja.
Hvat vilt tú heldur:

Skal eg buka teg?
Ella gevur tú mær posan?"

Rói rættir posan fram.
„Her.
Tak hann so.

Men so bukar tú meg ikki.
Ongantíð aftur.
Lovar tú tað?"

„Ja," sigur Bessi.
„Ongantíð aftur.
Tað lovi eg."

Bessi tekur posan.
So fer hann.

„Huff," sigur Rói.
„Hatta var nær við.
Men eg slapp undan."

„Ja," flennir Sanna.
„Hann helt, at tað var bomm.

Tú lumpaði hann.
Men hann sær skjótt kukkin."

Rói hálar í Leiku.
„Kom, Leika.

Nú fara vit heim.
Hann verður eisini illur við teg.

Tað var tú, sum kukkaði."